## VIÐMERKINGAR

# "Eina náttúru- og umhvørvisvinarligari Tórshavnar kommunu"

**Marin Katrina Frýdal**
*býráðslimur í Havn*



Ben Arabo (BA) setir í lesarabrævi um vikuskiftið spurning við litfaldaran um eina grønari Tórshavnar kommunu. Tað, ið BA sipar til, er avgerðin um at broyta verandi byggisamtykt fram við Oyrareingjalandinum, sum varð tikin á býráðsfundi seinasta hóskvøld. Á sama býráðsfundi varð eisini eitt annað mál samtykt, ið, eftir mínum tykki, ikki er við til at skapa "eina meira náttúru- og umhvørvisvinarligari Tórshavnar kommunu". Avgerðin, eg her sipi til, er samtyktin um at loyva skjótiítróttini innaftur á hitt náttúruvakra og fuglaríka lendið í Sandvíkum norðanfyri Hvítanes.

Men fyrst til ætlaðu havnaútbyggingina fram við Oyrareingjalandinum. Tíðum er tað soleiðis, at eitt stig tekur eitt annað við sær, og soleiðis hevur eisini verið í hesum máli. Tá farið varð undir at gera undirsjóvartunnilin um Vestmannasund, avgjørdi Kollafjarðar kommuna at taka ímóti tunnilstilfarinum, og varð tað fylt upp út fyri Oyrareingjum. Mær vitandi, varð eingin ítøkilig ætlan frammanundan løgd um nakra framtíðar havnaútbyggin har. Onkrastaðni skuldi tilfarið koyrast, og stutt var til Oyrareingir. Síðani varð Kollafjørður lagdur saman við Havnini, og arbeitt varð víðari uppá hesa, eftir mínum tykki, upprunaliga tilvildarligu avgerð. Táverandi havnanevnd fyriskipaði hesum, og hon læt m.a. gera eitt uppskot um eitt risaprojekt, ið mær tykir vera ein sonn neyðtøka av Kollafirði. Verður tann ætlanin nakrantíð tikin fram til realitetsviðgerð, er avgjørt neyðugt, at málið frá byrjan av fær eina sera nágreiniliga og fjølbroytta lýsing. Tí tann ætlanin kann fáa eina alstóra ávirkan á flutningsvinnuviðurskiftini fyri alt landið og má tí viðgerast í landshøpi. Umframt tað, fer hon at hava sera stóra ávirkan á bústaðar- og náttúruviðurskiftini í Kollafirði.

Men aftur til samtyktina í býráðnum seinasta hóskvøld. Samtyktin, ið her varð gjørd, fevnir einans um at fáa til vega heimildargrundarlagið at kunna gera verandi uppfylta øki nýtiligt til havnavinnuvirksemi (javnast, asfalterast og eina atløgubryggju), tí soleiðis sum økið liggur nú, kann tað hvørki brúkast til eitt ella annað.

Sum BA fullvæl kennir til, ið sjálvur er vaksin upp saman við politikki frá barnsbeini av, eru áskoðanirnar og áhugamálini so ymisk í tí politiska landslagnum, har tað tí javnan gerst neyðugt við kompromiloysnum. Verandi samgonguskjal fyri Tórshavnar býráð er heldur einki undantak. Har varð m.a. felt á blað, at uppfylta økið fram við Oyrareingjalandinum skal skipast til havnalag. Tó at mær persónliga hevði dámað best, at grótfyllingin varð tikin heilt burtur, og tilfarið nýtt á betri stað, so var eg tó ein teirra, ið atkvøddi fyri áðurnevndu býráðssamtykt seinasta hóskvøld; til tess at standa við gjørdar avtalur. Sjálv var eg ein av høvuðsstigtakarunum til, at borgarafundur varð hildin í Kollafirði í mars mánað. Við teirri jaligu móttøku, ið "Oyrareingjarætlanin" fekk á nevnda borgarafundi, og frá "Kollafjarðarnevndini" í summar, var ætlanin rímilig.

Lat tað vera sligið fast bæði væl og virðiliga, at býráðssamtyktin hóskvøldið bert fevnir um at gera broyting í verandi byggisamtykt, soleiðis at heimild fæst at skipa tað verandi uppfylta lendið á Oyrareingjum. Við hesi samtyktini er á ongan hátt tikin støða til eina møguliga nýggja stórhavn í Kollafirði. Tað verður ikki við mín góða vilja, at ein ætlan, sum á sinni byrjaði við eini bráðskundisavgerð í Kollafjarðar kommunu, so líðandi gerst til eina stórhavn, uttan at málið fyrst fær eina fullfíggjaða byggiskipanarliga málsviðgerð.

Síðani til náttúruperluna í Sandvíkum. Hesin einastandandi frílendismøguleikin varð tíverri ofraður á býráðsfundinum seinasta hóskvøld, tá avgjørt varð at lata skjótiítróttina sleppa inn á økið aftur. Lendið í Sandvíkum er ein alt ov virðismikil náttúru- og frílendisblettur, til at ein ávísur felagsskapur skal kunna leggja seg á tað. Ikki minst tær staðiligu áheitanirnar frá fuglafrøðini um at eira lendið, eigur at fáa býráðið at finna skjótiítróttini annað og betur egnað stað at vera á. Leirdúgvuskjótingin hevur tíverri munandi neilig árin á náttúruna, m.a. bæði við óljóði og ruski. Í summar hava skúlaungdómar hjá kommununi ruddað økið í Sandvíkum, og upptøkan eftir fyrrverandi skjótivirksemið var ikki tespilig, upp í billess av leirdúgvurestum, patrónum v.m.

Í Sandvíkum er fjøruslætt og eisini reint (eingin kloakk í nánd), og eru slík pláss ikki so mong longur nærindis Havnini. Har er talan um lendi við hópin av nýtslumøguleikum sum vælegnað frílendi hjá einum breiðum skara av borgarum, t.d. er tað eitt paradís hjá børnum at sleppa at spæla í eini fjøru við fjøruhyljum, har til ber (ella bar) at fanga bæði állar og kombikk, umframt at sjósíl eru (vóru) útfyri. Har er eisini tann gamla várgongu rættin hjá hoyvískingum, sum í dag er eitt fornminni í sjálvum sær. Í Sandvíkum er veðurgott og eitt ríkt og sermerkt fuglalív. Fyrr var vanligt hjá havnarfólki og fleiri at gera útferðir inn í Sandvíkar um summarið, og hóast landsvegurin hevur oyðilagt nakað av friðsæluni, hevði verið lagamanni at lagt tað soleiðis til rættis, at eitt nú dagstovnarnir høvdu høvið at vitja hagar. Tað hevði borið til at sett wc-/skiftirúm upp til teirra og at bygt onkur ból, so tey høvdu eitt stað at eti matpakkarnar. Eisini kundi økið verið vælegnaður tjaldingarstaður í ávísan mun.

Jú, víst er niðurfelda málið hjá sitandi býráðssamgongu m.a. at skapa ein størri trivnað ímillum borgararnar og harvið eina hægri lívsgóðsku fyri einstaklingin, og somuleiðis at skapa eina náttúru- og umhvørvisvinarligari Tórshavnar kommunu. Men eyðsæð er, at tað skal tíð til, og áskoðanir skulu mýkjast, áðrenn loysnarorðið um nýggja kós og nýggjan hugburð vinnur frama.

Livst so spyrt.

# Akstovan

**Heri Mohr**



Tað er kunngjørt Føroya fólki, at tann almenni stovnurin Bileftirlit Føroya hevur broytt navn til Akstovan. Vit hava eisini fingið at vita, at landsstýrismaðurin við vinnumálum svav fleiri nætur "uppá uppskotið", og at hann so líðandi hevur vant seg við navnið.

Hóast allir landsstýrismenninir hava tikið undir við navnabroytingini, eru tað óivað onnur, ið halda, at tað upprunaliga navnið, Bileftirlit Føroya, er meira sigandi, meira relevant til tað, ið hesin almenni stovnur stendur fyri. Í føroysku orðabókini 1998 er tilskilað, at orðið ak "er eitt ið kemur darlandi aftaná".

Vit hava tríggjar stovnar við eftirlitsfunktiónum: Arbeiðseftirlitið, Skipaeftirlitið og Bileftirlitið. Her er eingin ivi, øll vita, hvat hesir stovnar standa fyri. Hóast Bileftirlitið við 45 árum á baki hevur økt munandi um síni arbeiðsøki, serliga tey seinastu árini, so hevur øll hendan øking relation til motorakfør, og nógv tann størsti parturin av tí økta arbeiðinum stendst av bilunum: Vektgjald (incl. sýn), koyrikort v.m.

So hetta átti ikki at givið orsøk til navnabroyting ?

Hóast bæði Landsbankin og Toll-og Skattstovan eru kvistar skornir av Føroya Gjaldstovu, sum nú fram um alt annað er roknskaparstova landskassans, so er navnið óskalað.

Aftur til Akstovuna. Navnabroytingin gevur orsøk til fylgjandi spurningar:

- Við hvørjari grundgeving skuldi Bileftirlit Føroya hava nýtt navn ?
- Við hvørjari grundgeving skuldi Bileftirlit Føroya hava nýtt búmerki ?
- Hví varð nýtt navn til bileftirlitið ikki boðið alment út ?

Hví varð nýtt búmerkið til bileftirlitið ikki boðið alment út ?

# Javnið uppihaldsdeildina við jørðina

**Vagnur Michelsen**



3. februar 1962 komu átta sjúklingar av Sanatoriinum í Hoydølum oman í ta nýggju barakkina, sum var uppsett fram við Hospitalsvegnum. Hoydalar skuldu ikki longur hýsa sjúklingum men studentaskúlanæmingum og næmingum í framhaldsdeild. Skúlanæmingarnir fluttu inn í gomlu bygningarnar í Hoydølum og nýggjur skúlabygningur skuldi byggjast.

Fleiri havnarfólk vóru ikki fegin um myrku, dapru og ljótu barakkina fram við Hospitalsvegnum, sum í norðara enda gjørdist nýggj tuberkladeild og í sunnara enda uppihaldsdeild hjá eldri fólki, sum ikki vóru nóg birg at fara heim eftir uppihald á sjúkrahúsinum.

Eldri maður segði mær herfyri, at kendur býráðslimur í Havn, sum nú liggur undir grønu torvu, segði honum, at svarta barakkin bara var fyribilsloysn. Tí tá útbyggingin av Landssjúkrahúsinum var liðug, skuldi barakkin takast niðuraftur. Vit skriva nú oktober 2005, og myrka, dapra og ljóta barakkin stendur har framvegis.

Kemur tú fram við uppihaldsdeildini sært tú høvdini í eldri fólki innanfyri. Og tá sveima tankarnir.

Er tað veruliga so galið í Føroyum, at vit í 2005 bjóða borgarum slíkar umstøður? Sambært akfarsteljing 1. september 2003 koyrdu 8500 akfør framvið vindeygunum hjá teimum gomlu, 3750 annan vegin og 4750 hinvegin.

Góðan summardag er nógvur bilosur har á leiðini, tí upphaldsdeildin er lægsta punkt, og í hesum regndøgum sprutta akførini upp á bygning og vindeygu. Tí er tað ikki rein luft, tey gomlu anda í seg, um vindeyguni standa á gloppi. Á skitnu gongubreytini sæst mangan fólk í hvítum kitlum.

Nú ætlar landsstýrismaðurin í almannamálum at selja íbúðarbygningarnar, sum hoyra til Landssjúkrahúsið. Mín áheitan til landsstýrismannin er: "Javnið upphaldsdeildina við jørðina skjótast tilber og brúkið part av søluni av íbúðarbygningunum at byggja mannsømiliga upphaldsdeild har á leiðini, tí grundøkið er tøkt beint niðan fyri Landssjúkrahúsið og oman fyri Landssjúkrahúsið.

### Landssjúkrahúsið og fígging

Eg havi ongantíð skilt, at Landssjúkrahúsið ferð eftir ferð kemur í fíggjarligar trupulleikar. Sjálvandi kostar tað meira pening at reka eitt sjúkrahús, sum júst hevur fingið nýtíðarbygning, harvið fleiri møguleikar og skal fylgja við tíðini.

Tað er heilt burturvið, at sjúkrahúsið noyðist at lata aftur barnadeild i vikuskiftunum, steingja aðrar deildir í tíðarbilum, spara uppvenjingarmøguleikar hjá fólki, og ikki at gloyma, framvegis at varðveita myrku, dapru og ljótu barakkina, sum minnir ein um arbeiðsbarakkirnar á sinni í Mjørkadali ella um fangabarakkirnar á Balkan fyrst í nítiárunum ella undir seinna heimsbaradaga.

Og hvat so, um Landssjúkrahúsið fær játtað nakrar milliónir aftrat?

Í hesum døgum verður seinasta hond løgd á fíggjarlógina fyri 2006. Løgtingið hevur uttan mótmæli játtað sær sjálvum tjúgu milliónir til framhaldandi umvæling av løgtingshúsinum og fimm milliónir til løgmanssæti í Hoyvík o.a.

Er talan um Landssjúkrahúsið, sum vit øll í mun til partapolitik ella átrúnað skulu brúka, so eru fjølmiðlarnir skjótir við peikifingrinum, men ikki eitt orð um tíggjutalsmilliónir til óneyðugar íløgur í løgtingshúsið og løgmanssætið. Hetta hongur bara ikki saman.

Tað mátti verið stoltleiki hjá eini tjóð, sum ætlar at vera millum fremstu tjóðir í 2015, at havt vælvirkandi Landssjúkrahús. Men hetta kostar pening.

Var sum smádrongur til staðar 19. juni 1962, tá ið Petur Mohr Dam løgmaður, Pauli Dahl yvirlækni og Lars P. Jensen danskur innanríkisráðharri løgdu hvør sín grundarstein til nýggja Landssjúkrahúsið. Tá var longu myrka, dapra og ljóta barakkin longu tikin í nýtslu sum fyribilsloysn, meðan byggingin av Landssjúkrahúsinum fór fram. Barakkin stendur har enn.